Okkara stóra vetrar **ÚTSØLA** byrjar fríggjadagin 11/1-08.
Fríggjadagin er opið frá kl. 10 til 20 og Leygardagin frá kl. 10 til 17.
Hósdagin er stongt
Øll útsøluvøran fyri ½ **prís**.

**Klædnabúðin**
Skálavík · Tel 36 11 34

**Vest Móti**
Vestmanna · Tel 42 44 07

SJÓVAR KOMMUNA

# KUNNGERÐ

Samb. kunngerð nr. 109 frá 7. des. 2007 fer løgtingsval fram **leygardagin 19. jan. 2008.**

Atkvøðugreiðslan fer fram á hesum støðum:

**Í skulanum á Selatrað**

**og í bygdahúsinum á Strondum.**

frá kl. 10.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00, ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi fríggjadagin 18. jan. 2008, kl. 14.00 greiða brævatkvøðu á kommunuskrivstovuni.

Veljarar, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima. Boðað má verða frá á kommunuskrivstovuni, tlf. 47 27 27, innan fríggjadagin 18. jan. kl. 14.00.

Valkort verða send øllum veljarum, ið standa á vallistanum. Veljari, sum ikki hevur fingið valkort hósdagin 17. jan., eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna sum skjótast.

**Sjóvar kommuna**
Skúlavegur 10
490 Strendur

# Rimmar valCafé í Havn

Kom á spennandi valCafé við røðum, felagssangi, tónleiki og skemti.

Jóannes Eidesgaard og valevnini hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymi luttaka.

ValCafé'in verður leygarkvøldið 12. januar kl. 20 í Café C á Áarvegnum (við síðuna av Hotel Hafnia).

Øll, sum koma á valCafé, fáa spildurnýggju fløguna hjá Javnaðarflokkinum við valsangum.

**Øll eru vælkomin!**

***Suðurstreymoyar Javnaðarfelag***

# Alv verkstøðini í Smiðjugerði

## – søkja eftir starvsfólki til Træverkstaðið

Talan er um farloyvisstarv fyri snikkara, frá 1. februar 2008 og eitt ár fram.

Í Smiðjugerði er endurbúgvingarverkstaður við 4 deildum, har fólk arbeiða, sum antin hava torført við at fáa arbeiði ella hava tørv á at royna ella menna síni arbeiðsevni.

**Arbeiðsuppgávurnar á træverkstaðnum verða í høvuðsheitum**
- at læra næmingarnar eitthvørt handverk, sum kann seljast
- at menna og upplæra arbeiðstarnað fólk
- at eygleiða og meta um fólk í arbeiðsroynd
- at framleiða ymiskar lutir úr eitt nú træi.
- at hava um hendi verandi framleiðslu, har vit millum annað framleiða, fluguskáp, ting úr horni og ringbind. Talan kann verða um at arbeiða á øðrum eindum.
- at menna produktiónina og finna nýggjar uppgávur, sum hóskar tí einsstaka

**Førleikakrøv**
- viðkomandi útbúgving
- hugur at arbeiða við endurbúgving og at finna arbeiðs- og menningarmøguleikar
- evnir at læra frá sær
- dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- ert hugskotsfullur, kreativur og positivur

**Vit bjóða**
- spennandi arbeiði og góðan starvsfólkatrivna

**Løn og setanartreytir**
- starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran
- løn sambært avvarandi sáttmála
- starvið verður at seta 01.02.08 ella skjótast tilber

Meira fæst at vita um starvið, við at ringja á tlf. 350070. Spyr eftir Hannu Jacobsen, deildarleiðara.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. jan. 2008**

Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til:

**Sjálvsognarstovurin ALV**
**Smiðjugerði 6. kj.**
**Postboks 301**
**110 Tórshavn**

*brævbjálvin skal merkjast »umsókn verkstaður«*

SUNDA KOMMUNA

Vísandi til, at løgtingsval er útskrivað, skal hervið verða kunngjørt, at atkvøðugreiðslan fer fram 19. januar 2008. Atkvøtt verður millum kl. 10.00 og 20.00 og hildið verður fram, so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Valt verður á hesum støðum:**
- Veljarar búsitandi við Gjógv velja í skúlanum við Gjógv
- Veljarar búsitandi við Norðskála, á Oyrarbakka og á Oyri velja í Eydnuni á Oyrarbakka
- Veljarar búsitandi í Tjørnuvík velja í skúlanum í Tjørnuvík
- Veljarar búsitandi í Haldórsvík og á Langasandi velja í skúlanum í Haldórsvík
- Veljarar búsitandi í Streymnesi, Hvalvík og í Saksun velja í skúlanum í Hvalvík
- Veljarar búsitandi í Hósvík velja í skúlanum í Hósvík

**Brævatkvøða:**
Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at velja við brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag millum kl. 8.00 og 16.00, tó mikudag millum kl. 10.00 og 16.00, til og við fríggjadagin 18.januar 2008.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðið, og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 471020 í seinasta lagi 18.januar 2008 kl. 16.00.

**Valkort:**
Valkort verða send veljarunum í kommununi við postinum, og um persónur, sum heldur seg hava valrætt, ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at seta seg í samband við kommunuskrivstovuna á telefon 471020 sum skjótast.

***Minnist vinarligast til at hava valkortið við á val.***

*Oyrarbakki tann 9. januar 2008*

**Sunda kommuna**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki